# Ein sólskinsøga

BRYNJÁLVUR DANBJØRG



Lurtaði av tilvild eftir KVF, d.d. 18. mars 2010 kl 17:10 og út, sum prestur málber seg.

Eg visti ikki, hvør ið tosaði, men orðið fangaði, og ljóðaði sum søtur tónleikur í mínum oyrum.

Har vóru nógv evnir havd á lofti, og har vóru nógvir spurningar. Men hvørja ferð rungaðu svarini sum besti tónleikur í mínum oyrum.

Tað besta eg havi hoyrt í fleiri ár gjøgnum kringvarpið. Hóast politikarar og tað teir hugsa og gera, fyllir fjølmiðlarnar 95%, og verður endurtikið fleiri ferð um dagin. Og endursent uppaftur fleiri ferðir.

Undir samrøðuni nevndi spyrjarin navni Sjúrð, og eg hugsaði, man tað vera komikarin?

Líka mikið, svarini vóru líka greið og skilagóð, allan vegin í gjøgnum, ein fragd at lurta eftir einum so skilagóðum ungum manni. Einum sum eg helt bert vera ein komikari. Men gakk, har var vit og skil, sum krevst fyri at koma víðari í samfelagnum.

Eg havi í nógv ár saknað slíkt skilagott. Og tá eg fann út av, at tað var komikarin Sjúrður Skaale, segði eg, at best var at siga honum takk, og sum sagt so gjørt, tí hann situr inni við slíkari vitan sum okkara samfelag hevur brúk fyri, fyri at rykkja okkara politikarar burtur úr teirra konservativu hugsan, sum egoistiskt steðgar framburði.

Eg bað hann gera eitt upplýsandi skeið fyri politikarum, og taka Høgna við.

Eg havi ofta gjørt viðmerkingar til teirra politikk. Ikki fyri at vera negativur, men fyri at fáa menn at hugsa seg um.

Tí var henda samrøða í KVF, sum balsam fyri sálina, sum hevur verið meiðsla av jánkasligum avgerðum í Føroyum.

Góða eydnu Sjúrður: Tú skilir komikkin og meir enn tað, tú torir at vísa á tað komiska í okkara samfelag.

# Nær eru børnini skúlabúgvin og børnini skúlabúgvin?

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK
vegna Tjóðveldi



Rímilig semja er um, at tað eigur at verða obligatoriskt, at børn, sum fylla 6 ár í árinum, fáa ein skipaðan dagligdag, sum svarar til tað, sum aðrastaðni verður nevnt 0. flokkur ella forskúli.

Hetta kom fram á kjakfundi í fullsettum Miðlahúsi mikukvøldið, sum Tjóðveldi skipaði fyri. Har varð spurningurin um, hvørt børn okkara skulu byrja í skúla, í tí árinum tey fylla 6 ella 7 ár, til viðgerðar. Umboð fyri lærarar og pedagogar saman við einum sálarfrøðingi vóru í panelinum. Tey førdu øll, við hvør sínum innleggi síni sjónarmið fram, og fingu sera nógvar viðkomandi spurningar og viðmerkingar frá áhugaðum fundarluttakarum.

Brúgvin, um tað sum er best fyri barnið

Tað tóktist eisini at verða semja millum øll, sum høvdu orðið á fundinum, at tað er alneyðugt at byggja brúgv millum fakbólkarnar: Pedagogar og Lærarar, so tað ikki eru fakfelagsspurningar, sum fora fyri tí skilagóðu loysnini.

Spurningurin um hvørt 0 flokkur ella forskúlin skal hava høvuðssæti í fólkaskúlanum ella í barnagarðinum er viðkomandi, men eigur ikki at verða tað avgerandi. Tað avgerandi er sjálvandi, hvat er best fyri barnið. Og hvat tað er, sum teirra forvitni og búning spyr eftir. Útfrá tí eiga vit so at leggja karmarnar til rættis.

**Børn eru ymiskt og tó**

Børn eru rættiliga ymiskt. Tað kunnu vit øll verða samd um. Men nøkur generell viðurskifti ganga aftur hjá teim flestu: Vit læra at ganga, tá vit eru uml 1 ára gomul (pluss minus ½ mdr) Vit læra at tosa, tá vit eru 2½ ár (pluss minus 1 ár), vit sleppa av við blæuna, tá vit eru 3 ára gomul (pluss minus 1 ár), og sambært fólkaskúlalógini skulu, vit fara í skúla í tí árinum vit fylla 7 ár.

Henda áseting man verða íkomin, tí tað tá, tá ið lógin varð smíðjað, hevur verið hildið, at tað er ein hóskandi aldur at byrja skúlagongdina. Hesum aldri eru tað tó flest lond, sum eru farin frá:

Í Noreg kom fyri trimum árum síðani obligatoriskt krav um, at børn skulu í 1. flokk sum 6 ára gomul.

Í Danmark kom fyri einum ári, síðani obligatoriskt krav um, at børn skulu í 0. flokk sum 6 ára gomul.

Í Íslandi fara tey eisini í skúla sum 6 ára gomul – og ætlanin er at mann í Íslandi skal byrja í 1. flokki sum 5 ára gomul,

Í og Commonwelth londum fara tey eisini í skúla uml 5 ára gomul.

**Kjakið heldur vónandi fram**

Kjakið vísti, at fólk, sum fáast við børn hava stóran áhuga í og sterkar meiningar um hetta evnið, sum vónandi kemur at føra við sær fleiri almenn orðaskifti. Víst var á, at panelið kundi verið breiðari mannað. Tí kunnu vit bara vóna, at tað á komandi fundum um evnið, verður varpað ljós á sjónarmiðini hjá foreldrum, heilsufrøðingum, forskúlalærarum, - og hví ikki eisni hjá børnum í tí aldrinum, vit umtalað. Og so er eisini at vóna, at fólk, sum hava meiningar um evni nýta møguleikar at siga sína hugsan. Bæði í skrift og í talu.

# LÍV stovnar lutaíbúðarfelagið »LutaÍbúðarVirkið«

TÍÐINDASKRIV

LÍV hevyur stovnað lutaíbúðarfelagið P/F LutaÍbúðarVirkið at byggja og reka luta- og leiguíbúðir. Á hendan hátt verður pensjónskapitalurin virkin í tí føroyska samfelagnum og til gagns fyri tryggingartakararnar hjá LÍV, samstundis sum hetta skapar virksemi í búskapinum í landinum.

Tað er vanligt í útlondum, at pensjónsfeløg gera íløgur í fastogn, harundir í lutaíbúðir.

Tørvurin í Føroyum er eyðsýndur fyri hesum slag av íbúðum, og ætlanin hjá LÍV at gera íløgur á búalstaðarmarknaðinum hevur verið frammi fyrr.

Ein fortreyt er, at lógarkarmarnir eru til staðar, soleiðis at luta- og leiguíbúðir vera javnt settar við eigaraíbúðir. Tað eru útlit fyri, at lógargrundarlagið kemur upp á pláss, og tí metir felagið at tíðin er búgvin at fara í gongd.

Nevnd og stjórn í nýggja felagnum P/F LutaÍbúðarVirkið er tann sama sum í LÍV-feløgunum. Partapeningurin er 10 mió. kr. Stjóri í felagnum er Tummas Eliasen, nevndarformaður er Gunnleivur Dalsgarð.

Ítróttarsosialurin
– vit eru har tað hendir



Aftursvar til fallitterklæring Unga Sambandsins:

# Tey ungu eru ikki líkasæl og ábyrgdarleys – júst tí velja tey Tjóðveldi

Katrin Hovland Petersen úr Unga Sambandinum pástóð á landsfundi Sambandsins, at ungdómurin er líkasælur og ábyrgdarleysur, tá hann velur Tjóðveldi.

Katrin sigur: »Tey ungu, sum hugsa um Tjóðveldi eru ov ábyrgdarleys, tí tey hugsa ikki um børnini hjá sær og foreldrini hjá sær.«

Eitt ótrúliga vánaligt uppáhald og vánalig grundgeving, tá hon nú leggur upp til, at hon sum sambandskvinna er meiri umhugsin enn ung, sum fylkjast um tjóðveldishugsjónina.

Unga Tjóðveldið skilir væl, um Unga Sambandið er ørkymlað um, at tey ikki hava stóran fjepparaskara. Men erligt talt, hvør tímir at fáast við passivan statiskan sambandspolitikk?

Hvat er tað fyri ungdómur, sum ikki hevur dirvi at ganga frameftir, men heldur vil bakka?

Hvør ungdómur ynskir at fylkjast um ein politikk, sum:

- tvíheldur, at onnur kunnu stýra Føroyum betur enn føroyingar
- er fastlæstur í tí, sum er?
- berjist við hond og fót ímóti frambrøgdum, sum framsóknir føroyingar gera?

Er tað í roynd og veru ikki andsøgn, at nakað yvirhøvur eitur Unga Samband?

Ein tann størsta orsøkin til, at Unga Tjóðveldið er so vælumtókt, er tann, at vit arbeiða frameftir og steðga ikki, fyrr enn vit koma á mál.

Vit stremba eftir:

- at Føroyar verða ein republikk við egnum sjálvsavgerðarrætti
- at rættur politikkur kemur á dagskránna og ikki hesin núverandi kyksendis- politikkurin, sum hevur steðgað øllum samfelagsframbrotum

At ung fylkjast um Tjóðveldispolitikkin heldur enn Sambandspolitikkin er reinur logikkur fyri Unga Tjóðveldið.

Jú víst er tjóðveldisungdómur árvakin og ábyrgdarfullur.

**Landsnevnd Unga Tjóðveldisins**

# Aftursvar 2 til Kaj Leo Holm Johannesen

Hetta svarar løgmaður aftur, tá Unga Tjóðveldið spyr, um tey, sum longu hava eina útbúgving, skulu fara í skúla umaftur:

»Tey sum longu hava eina útbúgving fara sjálvandi ikki at taka eina útbúgving umaftur. Men tey kunnu nýta høvi at taka eina eftirútbúgving ella taka við tilboðum um førleikamenning, sum ALS skipanin veitir.«

Men hetta er ikki í samsvari við tað, sum Ernst Jacobsen, stóri í ALS, sigur. Ernst Jacobsen úttalaði seg um hetta evnið á pallborðsfundi um arbeiðsloysi millum ung í Miðlahúsinum 5. november 2009. Hann segði, at hesi, sum ikki hava verið á arbeiðsmarknaðinum, høvdu ongan rætt til ALS útgjald ella aðrar tænstur, sum ALS skipanin veitir.

*Vegna Unga Tjóðveldið*
**Jenus í Trøðini og Gunnhild Dahl Niclasen**